## Sangløta í kirkjuni

**Kunoy:** Tey, ið hava hug at hoyra eitt barnakór syngja í Kunoyar kirkju, fáa eitt gylt høvi til hetta skírisdag.

Tá skipa nevniliga fólk úr KFUM & K í Klaksvík, saman við fólki úr bygdini, fyri sangløtu í kirkjuni við ymiskum á skránni.

Umframt tað at barnakóri fer at syngja, verður eisini bíbliusøga og nógvur sangur á skránni til hesa sangløtuna, sum byrjar kl. 15.

**sb.**

## Broyta reglugerð fyri virðisløn

**Havn:** Nú skulu bókavørðarnir við skúlarnar í Havn velja ein lim í nevndina, sum avgerð hvør skal hava Barnabókaheiðurslønina hjá býráðnum.

Hetta samtykti býráðið á fundi hóskvøldið, nú felagslæraraáðið við teir kommunalu skúlarnar í Havn er avtikið. Hetta ráð hevur havt ein lim í hesi nevndini, men nú er reglugerðin broytt, soleiðis at henda fimmmannanevndin verður vald øðrvísi.

Hereftir verður nevndin so mannað við hesum liminum sum skúlabókavørðarnir velja, barnabókavørðinum á Býarbókasavninum í Havn, tveimum limum sum býráðið sjálvt hevur valt og formanninum í mentamálanevndini í býráðnum, sum eisini er formaður.

**sb.**

## Stevnudagar í summar

**Runavík:** Hóast tað so smátt er byrjað at vára, eru fyrireikingarnar til stevnurnar í summar longu farnar í gongd.

Á tveimum støðum við Skálafjørðin hava fólk longu fingið at vita, nær tvær av teimum lokalu stevnunum verða.

Fólk í Runavík kunnu longu nú byrja at gleða seg til Eystanstevnuna, sum verður í Runavík í døgunum 17. til 19. juni.

Og fólkið hinumegin fjørðin, kunnu gleða seg til mánaðin eftir, tá bygdastevnan á Skála og Strondum verður á skránni.

**sb.**

# John Allan formaður í Ellisakførum

AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Leygardagin 19. Mars høvdu Føroya Ellisakfør aðalfund. Tríggir nevndarlimir, Heini á Borg, Hans Jørn Nielsen og Eirikur Lindenskov, bóru seg undan afturvali, og í teirra stað vóru valdir Páll Danielsen, Julian Eliasen og John Allan Midjord.

Á nevndarfundi mánadagin skipaði nýggja nevndin seg soleiðis: John Allan Midjord, formaður, John William Old, næstformaður, Julian Eliasen, kassameistari, Páll Danielsen, skrivari, Petur Johannessen, nevndarlimur Varalimir eru: Eyðun Joensen og Hans Jákup Michelsen

Føroya Ellisakfør hava nú góðar 160 limir. Felagið varð stovnað í 1992, og er endamálið at varðveita ellisakfør í uppruna sniði, at veita limum hjálp og vegleiðing, at skapa limunum góðar umstøður at varðveita ellisakfør og at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu nøra um virksemi felagsins.



*Eini 30 limir vóru møttir á aðalfundinum hjá Føroya Ellisakførum leygardagin*

Felagið hevur til húsa yviri við Strond 22 í Havn. Felagið hevur eisini til húsa í gamla vatnbrunninum undir Gráasteini, sum er settur í stand at hýsa ellisakførum. Har er avfuktingarskipan sett upp, so tey 30-40 ellisakførini har standa í góðum, tryggum og turrum umstøðum.

Næsta tiltakið hjá felagnum verður árliga flaggdagskoyringin í sambandi við flaggdagshaldið í Havn flaggdagin 25. Apríl. Vikuna frammanundan verða Føroya Ellisakfør á torginum í SMS við einhvørjari forkunnugari framsýning.


Niður og upp sama dag



frá 27. mars

úr Vágum
8.15 - 14.45 - 16.45

úr Keypmannahavn
8.40 - 12.30 - 19.00

www.sansir.fo

Nú kanst tú fara arbeiðsørindi til Danmarkar um morgunin og vera heima aftur um kvøldið. Tú sleppur undan spilltíð og ert aftur til dystin fús dagin eftir. Sambandið víðari út í heim er eisini munandi betri, nú Atlantic Airways flýgur tríggjar ferðir til Keypmannahavnar og aftur hvønn dag.

Bílegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 00 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo



SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Skrivstovunæmingur

Fyri ein av kundum okkara, eitt størri reiðaravirksemi í Eysturoynni, verður søkt eftir skrivstovunæmingi innan fyrisiting.

Starvið

Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði við serligum atliti til bókhald. Útbúgvingin fer fram eftir galdandi reglum.

Lærutíðin er treytað av hvørjar útbúgvingar umsøkjarin hevur. Lærutíðin byrjar skjótast gjørligt.

Umsøkjarin

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur kunnleika til bókhald og roknskap, er vanur at arbeiða við teldu umframt at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Lønarviðurskifti verða sambært lærusáttmála.

Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 5. apríl 2005.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Árna Ellefsen, statsaut. revisor, á telefon 34 34 34.

TEAM 85

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 34 34 54
Telefax